# Skemt



## Gamal fiskur

Tað vóru skakandi tíðindi í útvarpinum her. Tey vildu verða við, at føroyingar eta helvtina av tí fiski, sum vit ótu fyri 30 árum síðani. Hvussu føroyingar nú eru komnir hartil, at vit eru farin at eta fisk umaftur, sum vit ótu fyri 30 árum síðani, segði søgan einki um. Men vit lata okkum ivast í, um fiskur, sum upprunaliga varð etin fyri 30 árum síðani, smakkar væl.

## Heppin

Lærarin fortelur næmingunum, at summi børn eru født ov tíðliga - og onnur ov seint.
Tá sigur lítli Petur:
- Áh, sum eg eri heldigur, tí eg eri føddur akkurát sama dag, sum eg fylli.



## Kunnu vit fáa hesi jólini

Hvít jól skulu verða tað mesta fantastiska sum finst. Jú, tað er heilt okay at ganga og frysta við bláum varrum um jóltíðir. Tað er fínt at eta ræst kjøt í bítandi kulda. Og tað er útmerkað at fara á jólafrokost í kavaroki. Men hevði tað ikki verið fantastiskt at kunna gjørt hetta í Sandágerði ella á Leynasandi. Enskir turistar halda jól á Bondi beach í Sydney.

## Í RANGASTRÚPAN

**Norrøna á flog?**
Illveður tarnar flogferðsluni – Norrøna fer ikki til tíðina í kvøld
*Útvarpið*

**Hvør er nevndarformaður?**
Kirkjuskatturin verður limagjald til fólkakirkjuna
*Kringvarp.fo*

**Droppa so heilsuátøkini!**
Almanna- og heilsumálaráðið vil hava fleiri sjúklingar til kanningar og viðgerðir í Føroyum
*Útvarpið*

**Ljóðar logiskt**
Síggja ikki sólarmyrkingina
*Portal.fo*

**Hvør man hann vera?**
Størsti revur nakrantíð fangaður í Bretlandi.
*Portal.fo*

**Góð jólagáva**
Til dømis kanst tú taka uppá
*Lýsing*

**Gott hugskot!**
Blaðstjórin skal hava koyrilin
*Portal.fo*

**Sigur seg sjálvt?**
Fekk bót fyri hassj
*Portal.fo*

**Vónandi ikki einsamøll**
ABBA límur umhugsar at endurstovna bólkin
*Vágaportalurin*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Eftirmæli

Eitt tað ringasta, helst tað ringasta, við at doyggja er, at tú ført ikki lisið minningarorðini um teg sjálvan. Tú ført heldur ikki at vita, um nøkur minningarorð eru yvirhøvur.

Tað er ikki fyrr enn fólk eru deyð, kólnað, farin í grøvini, og so antin uppeftir ella longri niðureftir, at onnur hava so øgiliga nógv gott at siga teimum og um tey.

Og so hoyra tey tað ikki, fáa heldur ikki lisið tað. Ein ræðulig lagna, sum bíðar eftir okkum øllum.

Øll eiga at fáa síni minningarorð, meðan tey enn eru her. Øll hesi fløvandi orðini høvdu eisini longt teirra lív.

Men soleiðis er ikki. Vit bíða við at siga við fólk, at tey eru fitt til tey ikki fáa takkað okkum.

Og hvussu við øllum teimum, sum eingi minningarorð fáa við sær út í einkið?

Forbannað ikki at sleppa at lesa tað, sum tey fara at skriva um meg, tá eg eri over and out. Um nakað verður.

Her havi eg hug at steðga á eina løtu og nevna ein nekrolog, sum eg las í danska blaðnum Information. Tað var fyrst í hálvfjerðsunum, minnist meg rætt.

Tey vóru ljót, tey orðini. Einki rós, ikki so frægt sum skammrós, tann deyði fekk. Lýsingarorðini vóru reyð.

Niðurstøðan var greið: endiliga fór hann, hasin dummi fanin.

Hví ólukkan fara soleiðis við einum líki? Hví ikki bara tiga og einki skriva?

Jú, maðurin, sum skrivaði minningarorðini, hevði rætt og slætt einki gott at bera tí deyða. So einfalt var tað. Høvundurin var virkin í donsku mótstøðurørsluni undir krígnum. Hann var millum teirra, sum stovnaðu blaðið Information. Tann deyði var boðfretur og reyvasleikjari hjá nasistunum. Honum varð ikki ynskt hvíld í friði.

Spell, at eg ikki klipti mær hasi minningarorðini úr blaðnum og goymdi tey. Tey vóru og eru enn eitt kuriosum.

Vónandi hevur tann, sum skrivaði, sagt tí, hann skrivaði um, alt hetta, meðan hann livdi. Tí tá hann var farin, fekk hann sum sagt einki við av tí, skrivað varð um hann.

Sparka liggjandi mann? Jú, gamaní, men tann, sum lá, var longu deyður.

Sárini frá krígnum, krígsskaðarnir, lekjast ikki.

Danir gjørdu mótstøðu, harða mótstøðu, tá tey vóru hersett. Tað er vanligt, tað gera øll fólk uttan føroyingar.

Tað undarliga er, at nú Danmark er við í tveimum hersetingum langt burturi, partur av amerikonsku imperialismuni, eru tey ørkymlað hjemme i Danmark, tí tey hersettu gera mótstøðu. Ein øgiligur jammur, hvørja ferð ein hermaður verður skotin ella sprongdur í luftina. Og tað er ikki eiti av minningarorðum heldur.

Men er hetta ikki kjarnin í øllum kríggjum? Drep ella verð dripin. Eitt kríggj er ikki eitt telduspæl.

Aftur til minningarorðini. Kanska prógva minningarorð bara nøkur onnur orð: tú veitst ikki, hvat tú hevði, fyrr enn tú hevur mist tað.

Og tí koma tey góðu orðini ikki fyrr enn ov seint.

Fyri at vera vís/ur í, at tú ført nøkur minninarorð yvirhøvur, ber til at skriva tey sjálv/ur, undir dulnevni, senda tey til bløðini við klausuli um ikki at prenta tey, fyrr enn andlátið og jarðarferðin eru lýst.

Tað var ein, sum stúrdi so nógv fyri deyðanum. Alla tíðina stúrdi hann, Hann stúrdi so nógv, at hann orkaði ikki at liva við hesi stúringini. Hann beindi fyri sær.

Ikki tí, eg vænti mær ikki meira av deyðanum enn av lívinum. Bæði eru eittans.

Sum oftast eru minningarorð bara eitt eftirmæli uttan formæli.